# RØÐIRNAR



Ray Winstone er framúr í leiklutinum sum privatdetektivurin Vincent

## 5 Lewis

Tá ið Morse takkaði fyri seg, fekk hjálparmaður hansara sína egnu røð. Lewis kemur afturíaftur sum løgreglumaður í Oxford, og hann fær nú ein hjálparmann, sum hann kann ráða yvir. Nógvir av pørtunum í røðini ganga fyri seg í skúlaumhvørvi í Oxford, og søgurnar eru góðar og rættiliga typiskar enskar. Tríggjar sesongir eru gjørdar av Lewis, og boðað er frá, at eitt fjórða umfar skal gerast. Samanlagt eru 12 partar gjørdir síðani 2006.

## 6 Touch of Frost

Jack Frost er ikki lættur at hava við at gera, hann er í støðugum stríði við leiðsluna hjá sær, men hann leggur nógv fyri í arbeiðnum sum kriminalpolitistur. Hann hevur skiftandi hjálparmenn afturat sær, og málburðurin kann verða harður. 42 partar eru framleiddir í røðini síðani 1992, og seinastu partarnir vórðu sendir í enskum sjónvarpi á páskum.



Jack Frost er ikki lættur at hava við at gera

## 7 Vincent

Ray Winstone spælir tann harði og buldraligi privatdetektivurin Vincent, sum er leiðari fyri einum liði av fólki, sum sneytar eftir ótrúgvum fólkum, harðligum ungfólki og drápsmonnum. Tíverri vórðu bert átta partar gjørdir í hesi røð, men teir eru avgjørt verdir at síggja. Ikki minst takka verið frálíka høvuðsleiklutinum hjá Ray Winstone.

## 8 Hercule Poirot

Belgiski detektivurin Hercule Poirot er nakað fyri seg. Agatha Christie skrivaði søgurnar um Poirot, og fleiri kendir sjónleikarar hava spælt Poirot í filmum. Síðani 1989 hevur David Suchet dugað framúr væl at gjørt Poirot til ein livandi persón í sjónvarpsfilmum, og nú er hann við at koma á mál við at hava spælt allar tær upprunaligu søgurnar um Poirot á filmi.

## 9 Taggart

There's been a murder! Tað er tiltikin setningur tikin úr kendu skotsku krimirøðini, sum er tann drúgvasta krimirøðin í Bretlandi nakrantíð. Fyrsti parturin við Mark McManus í høvuðsleiklutinum varð sýndur í 1982, og á jólum í fjør var partur nummar 100 vístur. Í 1994 doyði McManus brádliga av sjúkum, meðan hann var í holt við upptøkur til Taggart, men røðin helt fram, og nú er Matt Burke leiðandi løgreglumaðurin í røðini, sum framvegis ber navnið Taggart.

## 10 Sherlock Holmes

Søgurnar hjá Sir Arthur Conan Doyle um Sherlock Holmes eru klassiskar, og ein long røð av sjónleikarum hava verið í leiklutinum sum Sherlock Holmes. Men tað er neyvan nakar sjónleikari, sum hevur tulkað Sherlock Holmes so sannførandi sum Jeremy Brett, tá ið hann spældi Holmes í árunum frá 1984 til 1994. Í hansara útgávu er Sherlock Holmes spontanur og genialur hvørt um annað.